**Til Løgtingsins Uttanlandsnevnd**

Víst verður til teldupost frá Uttanlandsnevndini tann 4. apríl 2019 við spurningum í sambandi við viðgerð av løgtingsmáli nr. 104/2018: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af udlændingeloven.

Vegna Poul Michelsen, landsstýrismann í uttanríkis- og vinnumálum, verður svarað undir einum:

Lógaruppskotið fevnir ikki um tey mál, sum spurt verður um.

Tað eru dómstólarnir, ið taka avgerð um útvísing, um ein útlendingur verður dømdur fyri at hava framt lógarbrot, sbr. § 49, sbr. §§ 22-24 í anordning nr. 182 af 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven (útlendingalógini, sum er galdandi fyri Føroyar). Mál um fyrisitingarliga útvísing (*administrativ udvisning*) eru ikki fevnd av avmarkingini í lógaruppskotinum og harvið heldur ikki av delegatiónsheimildini, sí s. 26 í viðmerkingunum til danska lógaruppskotið (fylgiskjal 2). Tað er *Udlændingestyrelsen*, ið tekur avgerð í málum um útvísing í sambandi við lógarbrot, álvarsama hóttan móti lóg og landaskili, trygd ella heilsu, og tá útlendingur uppiheldur sær í landinum, uttan at hann hevur fingið loyvi frammanundan. Danska løgreglan hevur marknaeftirlitið um hendi.

Higartil hava tað verið sera fá mál árliga á út- og avvísingarøkinum, ið viðvíkja Føroyum. Kortini er tørvur á samstarvi á hesum økinum í sambandi við møgulig mál um útvísing av útlendingi, sum hevur búð í Føroyum í longri tíð, sbr. § 26 í útlendingalógini, sum er galdandi fyri Føroyar. Framyvir verður tað Útlendingastovan, ið skal lýsa viðurskiftini hjá tí ákærda.

Vinaliga/Kind Regards

Elisabeth F. Rasmussen
Løgfrøðingur / Legal Adviser

Uttanríkis- og vinnumálaráðið/Ministry of Foreign Affairs and Trade
Tinganes • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 30 10 75 • Mobile (+298) 55 10 75
elisabethr@uvmr.fo • www.uvmr.fo